umborð

# Teir ungu skulu læra at bøta trol

**24 mans eru knýttir at ísfiskatrolarunum, Vestmenningi og Fram. Manningin á brúnni og maskinmenninir eru tveir túrar umboð og tveir í landi, og dekkararnir eru tveir umborð og ein í landi. – Vit hava eina góða blanding av tilkomnum og ungum fólki, og tað er eitt krav, at ungu menninir læra at fáast við trolreiðskap. Einaferð skulu teir standa við ábyrgdini, sigur skiparin, Arvid Petersen**



*Teir ungu skulu taka við, tá teir eldru leggja frá sær. Tí er neyðugt, at unga fólkið lærir at bøta og at fáast við trolreiðskap*
*Mynd: Karstin Vang*

## Umborð



**Vilmund Jacobsen**
blaðmaður
vilmund@sosialurin.fo

Fáar bygdir í Føroyum munnu eftir fólkatalinum hava fostrað fleiri trolmenn, enn Vestmanna hevur gjørt. Bygdin eigur nógvar mans við drúgvum royndum á troldekki. So hvørt, sum teir tilkomnu eldast, taka ungir menn við, og ungu menninir vera lærdir at taka upp eftir teimum, sum undan gingu.

Við góðum og dugnaligum fólki á øllum postum, er ikki neyðugt, at skiparin sjálvur er besti trolmaðurin. Hvør dugir síni ting, og tað ger skiparin eisini, men hansara uppgáva er í fyrsta lagi á brúnni.

Arvid Petersen, sum er annar skiparin umborð á ísfiskatrolaranum Vestmenningi, ásannar, at hansara royndir á dekkinum eru lutfalsliga lítlar.

- Eg havi sjálvur ongantíð siglt sum dekkari, og tí lati eg dekkararnar fáa frið at gera sítt arbeiði. Og tó; man fer niður á dekkið at práta av og á, og tá rættir man eina hond, um tað er neyðugt. Eg dugi eitt sindur at skera, og man kann í aðrar mátar vera teimum til hjálpar, men allar finessurnar, sum teir kønu trolmenninir duga, dugi eg ikki.

Skiparin heldur tað hava stóran týdning, at teir yngru menninir læra at bøta og fáast við trolreiðskap, tí einaferð fyrr ella seinni skulu teir standa við ábyrgdini á dekkinum, sum hann tekur til.

### Skipari í tvey ár

Vestmenningur og Fram eru gomlu dalstrolararnir, sum teir vórðu róptir. Stígarklettur og Hádegisklettur eru upprunaligu nøvnini, og skipini vórðu smíðað á Tórshavnar Skipasmiðju í 1988 og 1989. Úr Føroyum vórðu tey seld til Ný Sælands í fyrru helvt av nítiárunum. Har vóru tey í nøkur ár, til skipini aftur vórðu keypt til Føroya. Í januar ár 2000 kundu tey fara aftur í føroyskan sjógv undir nýggjum eigara, sum var P/F Meðalsbrekka í Vestmanna og nýggju nøvnunum, Fram og Vestmenningur.

Sjey mans eru við hvørjum skipi hvønn túrin, og tilsamans eru 24 mans knýttir at báðum skipunum.